## Kórferð til Finlands

Í september fara Vágakórið, Ljómur og Toftakórið ferð til Finlands á kórstevnu. Farið verður, týsdagin 21 september beinleiðis til Vasa í Finlandi. Flogið verður heimaftur sunnudagin 26 september. Í samband við ferðina eru nøkur pláss tøk til gestir. Møguleiki er tí hjá áhugaðum at ogna sær eina serliga bíliga ferð til Finlands. Áhugað kunnu melda seg til ferðina hjá Niels O Joensen á tlf. 219899. Umframt flogferðina er møguleiki til pakkaferð við innivist og mati allar dagarnar. Sjálvandi er eisini møguligt at tilmelda seg til sjálva kórstevnuna, og soleiðis taka lut í øllum tí, sum fer fram á stevnuni, og knýta vinarbond við syngjandi úr øllum norðurlondum.

## Ísland er reinast

Ísland er tað reinasta landið í heiminum. Tað er í hvussu er niðurstøðan av einari kanning, sum vísindafólk á lærdu háskúlunum Yale og Columbia í USA hava gjørt. Tey hava mátað 25 ymisk viðurskifti so sum luft, vatn, óspilta náttúru, heilsu og reina orku. Síðani hava tey lagt úrslitini saman í eina serliga stigaútrokning. Av 100 møguligum stigum fær Ísland 93,5 og er reinasta land í heiminum. Sveis er á øðrum plássi, Costa Rica er nummar trý, Svøríki nummar fýra og Noreg nummar fimm. Av teimum 32 londunum, sum eru kannað, er Sierra Leone niðast við 32 stigum.

# Stórir møguleikar í øktum tilfeingi

**MAKRELUR - Stórir møguleikar liggja í veiði og innfrysting av øktum makreltilfeingi. So hvørt, sum føroysk vinna sær, at vit hava hetta tilfeingi, ivist eg onga løtu í, at ymiskar nisju-framleiðslur høvdu stungið seg upp, sum upp á sikt kunnu fáa stóran samfelagsligan týdning, sigur Ari Thomasen, stjóri í Kovanum**



**FISKAVØRUR**

*- Tá føroyskir politikarar tosa um ES, verður oftast tikið fram, hvørja ávirkan ES fer at hava á okkara fiskivinnupolitikk, meðan minni verður tosað um at fáa í lag ítøkiligar avtalur, sum geva føroyskari vinnu møguleikar at selja okkara fiskavørur tollfríar á ES-marknaðinum, sigur Ari Thomasen, stjóri í Kovanum*

Vilmund Jacobsen

Nú landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, ætlar at áseta Føroyum eina eginkvotu av makreli upp á 150.000 tons í ár, er spurningurin, hvørjir "aktørar" í føroyskari fiskivinnu á landi kunnu hugsast at hava áhuga í øllum tí tilfeingi, sum talan kann gerast um.

Í strandalandaavtaluni millum Føroyar, Noreg og ES hava Føroyar átt minni enn 5% av samlaðu makrelkvotuni upp á 570.000 tons, meðan Noreg og ES hava kannað sær nógv tann størsta partin.

Avtalan gongur yvir eitt ár í senn, og í ár eru londini ikki komin ásamt um býtið av kvotuni.

Jacob Vestergaard hevur sagt, at Føroyar krevja í minsta lagi at fáa 15% av kvotuni, um vit skulu verða við í avtaluni fyri 2010.

Einki bendir á, at Noreg og ES fara at eftirlíka hesum kravi, men samráðingar verða aftur í Reykjavík 5. og 6. mai millum partarnar.

Landsstýrismaðurin hevur samstundis boðað Felagnum Nótaskip frá, at tað liggur í kortunum, at føroyska eginkvotan av makreli í 2010 verður 150.000 tons.

### Stórt tilfeingi

Sum skilst er stórur áhugi kring landið fyri øllum tí tilfeingi, sum makrelurin er og tí virksemi, sum hetta tilfeingi kann geva føroyskari vinnu.

Kovin í Sandavági er niðursjóðingarvirkið, sum gjøgnum árini hevur gjørt ymiskar royndir við at niðursjóða ymisk fiskasløg og rækjur. Í løtuni niðursjóvar virkið bara rogn, tí her hava Føroyar eina tollfría kvotu í ES.

Nú líkt er til, at føroysk vinna fer at kunna ríkast við stórum makreltilfeingi í 2010, hevur stjórin í Kovanum, Ari Thomasen, hugt at tollviðurskiftunum fyri sølu av niðursjóðaðum makreli til ES.

Men her sær ikki gott út, tí ES hevur 20% tollverjugarð fyri niðursjóðaðan makrel úr Føroyum sum ger, at Kovin ongan møguleika hevur at gerast veitari, um felagið annars sá sær ein møguleika til tess.

- Vit hava ongan møguleika at gerast kappingarførir við niðursjóvaðum makreli, tá tollurin er so høgur, staðfestir Ari Thomasen.

Hann vísir á, at tá føroyskir politikarar tosa um ES, verður oftast tikið fram, hvørja ávirkan ES fer at hava á okkara fiskivinnupolitikk, meðan minni verður tosað um at fáa í lag ítøkiligar avtalur, sum geva føroyskari vinnu møguleikar at selja okkara fiskavørur tollfríar á ES-marknaðinum.

- Í Danmark og Bretlandi eru stórir framleiðarar av niðursjóðaðum makreli, og hesir hava so funnið út av, at Føroyar kunnu gerast ein kappingarneyti á teirra marknaðum. Alla tíðina fer eitt lobby-arbeiði fram, og við tíðini eydnaðist teimum eisini at leggja toll á niðursjóvaðar makrelvørur úr Føroyum.

### Kappingarfør vinna

Ari Thomasen vísir á, at Føroyar hava góð skip, og føroysk vinna er kappingarfør.

- Tá vit møta okkara kappingarneytum í útlandinum, eru vit eisini kappingarførir, og vit høvdu eisini fingið okkara part av marknaðinum við makrelinum, um so var, at vit vóru javnbjóðis partar. Hetta vita okkara kappingarneytar og framleiðarar í ES. Tí verður hesin tollur lagdur á okkum fyri at gera okkara umstøður truplari.

Stjórin í Kovanum ivast onga løtu í, at har Føroyar hava rávøruna, sum nú er líkt til, at vit fáa við makrelinum, kunnu vit eisini gerast kappingarførir, um kappingin er undir somu treytum – og ikki við høgum tollverjugørðum.

> **»... vit hava ongan møguleika at gerast kappingarførir við niðursjóðaðum makreli, tá tollurin er so høgur...**
>
> *Ari Thomasen*

### Stórir møguleikar

Ari Thomasen ásannar, at stórir inntøkumøguleikar liggja í einum tilfeingi sum makrelinum.

- Her liggja stórir møguleikar við veiði og innfrysting av hesum tilfeingi, sum síðan kann seljast til aðrar at framleiða, og eg vænti eisini, at ein partur hevði ligið eftir hjá fóðurvirkinum Havsbrún í Fuglafirði.

Stjórin í Kovanum ivast onga løtu í, at so hvørt, sum føroysk vinna sær, at her liggur eitt stórt tilfeingi, høvdu eisini ymiskar nisjuframleiðslur stungið seg upp, sum upp á sikt kunnu fáa stóran samfelagsligan týdning.

- Eg ivist onga løtu í, at føroysk vinna skjótt hevði blivið dugnalig til ymiskar framleiðslur úr makreli, og við tíðini høvdu vit eisini megnað at gjørt keyparar og viðskiftafólk hjá teimum "bundnar" at okkum sum framleiðarum.

Ari Thomasen sigur, at meðan niðursjóving sum heild minkar, er marknaðurin fyri niðursjóvaðum fiskavørum veksandi, tí fiskur gongur undir at vera heilsugóður við eitt nú høgum innihaldi av omega3-feittsýrum.

vilmund@sosialurin.fo